# TILTØK

**Samkoman Lívdin**
Í kvøld kl. 19.30 Bøn- og bíbliutími úti á Fløtum. Zacharias Z. undirvísir um Nehemia 4/4.
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30 Jákup Jacobsen talar um: HVat segði Jesus um Himmalin? og tilbiðjanarmøti kl. 12 Høgni Johannesen talar um: 1. Kor. – Væntandi sjálvdisiplin. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur. Heimasíða. www.livdin.fo

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17 AWANA.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti har evnið verður Efesusbrævið kap. 4-6.
Hóskvøldið kl. 20 heldur møtirøðin áfram við evninum: Efesarbrævið kap. 4-6. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Ápostlasøgan kap. 2, v. 28-47.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Regin Høgnesen.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. fl. og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Mourits Mouritsen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

**Havnar kirkja**
Várkonfirmatiónirnar 2003 verða 30. mars., 6. apríl og 13. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju týsdagin 4. februar kl. 15. Markið millum Suðurstreymoyar eystara og vestara prestagjald er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

**Saron, Vestmanna**
Týsdagin kl. 20 Opið hús fyri ung.
Hósdagin kl. 19 Frítíðararbeiði.
Telefonandaktin 424 741.

**Mansstevna, Sørvágur**
Mansstevna verður í Sørvági í døgunum 14.-16. feb. Møtir og seminar verða í Missiónshúsinum, meðan stevnuluttakararnir gista og eta á Hotel Vágum. Nærri fæst við at ringja til Harald Haraldsen, tlf. 217506/314027.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 6. feb. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Evangeliskt møti**
verður í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum »Hæddini« í Runavík mikudagin 5. februar kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin. Vibeke Schaffalitzky og Inger Johanna Hildershavn.

**Thabor, Fuglafjørður**
Týsdagin kl. 20 Heri Tróndheim talar, Hannis Hansen og Tórhild Bjarkhamar syngja.
Mikudagin kl. 20 Regin Høgnesen talar, Streingjakórið á Glyvrum syngur.
Hósdagin kl. 20 Regin Olsen talar, Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20 í Glyvra-Hanusars húsi, bíbliutími: 1 Kor. 14,26-40 við Peter O. K. Olofson.

**Lívsins Orð**
Húsbólkur 1 møtir hjá Charles Johansen og húsbólkur 2 møtir hjá Dánjal Gaardlykke mikukvøldið kl. 20.
Tim 5 verður hósdagin kl. 17.30 og Bøn fyri kvinnur kl. 19.
Barnamøti verður fríggjadagin kl. 17.15. Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.

**Thabor, Fuglafjørður**
Missiónsvikan byrjar sunnudagin 2. februar við familjumøti kl. 18. Barnakórið syngur, tað verður felags nátturði og innsavnan.
Mánadagin 3. februar kl. 20 talar Uni Næs og Thaborkórið syngur.
Týsdagin kl. 20 talar Heri Tróndheim, Hannis Hansen og Tórhild Bjarkhamar syngja.

**Siloa, Fuglafjørður**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Osmund Justinussen talar. Evni: Dánielsbók – tíðin fyri útlegdina til Bábel. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jóhan Petur Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Betania, Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Møtiskrá hjá føroyska trúboðaranum í DK**
3. feb. í Spjald missiónshúsið kl. 19.30.
4. feb. í Agger missiónshúsið kl. 19.30.
5. feb. í Skarild missiónshúsið kl. 19.30.
6. feb. í Gårde missiónshúsið kl. 19.30.
10.-16. feb. í Dronningslund missiónshúsið, hvørt kvøld kl. 19.30.
17. feb. í Finnerup missiónshúsið kl. 19.30.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar. Á skránni er upplestur, sangur, spøl, prát o.m.a. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319130/61 655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3. februar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491. **Hósdagin 13/2 verður skeið í mynsturtøving við nálum. Tilm. 316491**
*Týsdagin 4. februar*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Kolagrevstur**. Steingrím Niclasen
*Mikudagin 5. februar*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur – sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 6. februar*
kl. 10.30-11 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 7. februar*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði – høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
kemur saman hvørt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18 við ymiskum tiltøkum. Øll, sum eru 60 ár og eldri og búgva í Tórshavnar kommunu eru vælkomin at gerast limir. Vit hava tað sera hugnaligt, so setist ikki aftur.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**V4-dráttur**
**í drátti nr. 1473**
**1. februar 2003**

**Tølini:** 9 - 17 - 20 - 22 - 25 - 37 - 44 - 51 - 53 - 60 - 67 - 72 - 75 - 81 - 90 - 95

**Tveir vinnarar**
Snars. nr. 2441941, Saltangará
Snars. nr. 2445533, Klaksvík

**Eykavinningur**
Í februar er ein eykavinningur upp á 100.000 krónur. Drigið verður leygarkvøldið 22. februar millum allar seðlarnar, sum spæla við í februar.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



# Stórfingin ungdómsmentarstevna

**Um vikuskiftið hevur stór ungdómsmentanarstevna verið í Norðurlandahúsinum í Havn. Ungdómar úr øllum landinum savnaðust saman, har teir hava fingist við eitt hvørt listarligt alt vikuskiftið**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*



*Ung í Føroyum 2003 er heitið á ungdómsmentanarstevnuni, sum hevur verið hetta vikuskiftið. Ung úr øllum Føroyum hava tikist við eitt hvørt listarligt, sum tey sýndu fram á endaframførslu sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

»Ung í Føroyum 2003« er heitið á ungdómsmentanarstevnuni, sum hetta vikuskiftið hevur verið uppi í Norðurlandahúsinum. Ung úr øllum Føroyum savnaðust eitt vikuskiftið um mentantina.

Á skránni vóru pallframførslur, sangur, tónleikur, skriving, dansur, list og nógv, nógv annað.

60 ungdómar úr øllum Føroyum luttóku á stevnuni. Tá stevnan var fyri tveimum árum síðani, vóru tað 60, ið teknaðu seg, men hesuferð vóru tað heili 110 ung, sum ynsktu at vera við, so áhugin er heilt vist stórur.

Stevnan endaði við eini endaframførslu sunnukvøldið, har tey ungu vístu, hvat tey høvdu fingið burtuúr alt vikuskiftið, og tað var ikki so heilt lítið.

Lesið meira í blaðnum í morgin, har tosað verður við fyrireikarar, luttakarar, verksmiðjuleiðarar og nógv annað.

# Klakkur rokfiskiskap

Klakkur hevur havt ein avbera góðan túr. Skipið kom á Klaksvík sunnudagin við 200.000 pundum, sum teir høvdu fingið í tíggju dagar. So nógvur fiskur var, at tað var neyðugt at seta fisk á dekkið eisini. Lastin rúmar minni í dag. Klakkur varð liðugt umbygdur seinasta summar, og síðani tá hava teir havt fiskin í køssum í lastini. Áðrenn lá fiskurin leysur, og tá var rúm fyri munandi meira í lastini sjálvari.

Skiparin á Klakki, Líggjas Johannesen sigur, at fiskiskapurin hevur verið góður í seinastuni og prísurin rímuliga góður.

Klakkur landar á Kósini og fer væntandi avstað aftur mikudagin.



*Klakkur hevur havt rokfiskiskap á seinasta túrinum. Teir fingu 200.000 pund í tíggju dagar. So nógvur fiskur var, at tað var ikki rúm fyri øllum í lastini*

*Mynd: SáH*

**- sae -**

# Ætlaði at ræna Restorff´s bakarí

**Leygarkvøldið ætlaði ein fullur maður at ræna bakaríið hjá Frants Restorff niðri í miðbýnum í Havn**

Løgreglutíðindi
Ingrid Bjarnastein

Um sjey tíðina leygarkvøldið kom ein fullur maður inn í bakaríið hjá Frants Restorff í miðbýnum. Hann segði við genturnar, sum arbeiddu har, at talan var um eitt rán, og um hann ikki fekk allar pengarnar, sum vóru í kassanum, so snaraði hann høvdið av teimum.

Maðurin hevði ongi vápn at hótta við, og hann fekk ongar pengar við sær. Tíggju minuttir seinni, var maðurin handtikin uppi í Blákross-stovuni.

Politiið í Havn upplýsir, at teir høvdu fingið eina greiða frágreiðing um, hvussu maðurin sá út. Maðurin varð fongslaður og var í grundlógaravhoyring sunnudagin. Hann er fonglsaður í fýra vikur.

# Koyrdi ávirkaður útav

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygarkvøldið koyrdi ein bilur útav Norðara Ringvegi í Havn. Tveir ungir mans vóru við, og førarin var í stóran mun ávirkaður av rúsdrekka. Førarin var 19 ára gamal. Hann verður ákærdur fyri rúsdrekka koyring. Teir báðir, ið við vóru, fingu onkrar smávegis snuddir, og bilurin fekk eisini eitt sindur av skaða. Sløkkiliðið var og tók bilin upp seinni.

## Friðarligt

Annars hevur verið ógvuliga friðarligt kring landið um vikuskiftið. Politistøðirnar kring landið siga, at lítið og onki hevur verið at gjørt.

Í Fuglafirði var annað innleiðandi umfar av Prix Føroyar kappingini, og har var ein maður so áhaldsin, at hann datt á sjógv. Ein løgreglumaður fekk togað hann uppaftur, og hann varð koyrdur til hús.

Onkur var eisini farin til hendurs inni í Mentanarhúsinum, men tað hevði ikki so nógv upp á seg. Annar breyt eina tonn.

Úr Klaksvík verður sagt, at ein koyrdi ávirkaður í býnum sunnunáttina, og hann verður ákærdur fyri rúsdrekkakoyring.

Og eisini á Gøtueiði hevði ein eisini koyrt ávirkaður leygarkvøldið.

Sum heild letur politiið væl at vikuskiftinum, sum júst er farið afturum brekku.


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Týsdagin 04.02. kl. 18⁰⁰ – Týsdagin 04.02. kl. 22³⁰
Mikudagin 05.02. kl. 18⁰⁰ – Mikudagin 05.02. kl. 22³⁰
Hósdagin 06.02. kl. 18⁰⁰ – Hósdagin 06.02. kl. 22³⁰




Týsdagin 04.02. kl. 20⁰⁰ – Mikudagin 05.02. kl. 20⁰⁰
Hósdagin 06.02. kl. 20⁰⁰




Týsdagin 04.02. kl. 19⁰⁰ – Mikudagin 05.02. kl. 19⁰⁰
Hósdagin 06.02. kl. 19⁰⁰




Týsdagin 04.02. kl. 21³⁰ – Mikudagin 05.02. kl. 21³⁰
Hósdagin 06.02. kl. 21³⁰ – *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 07.02. kl. 17⁰⁰ – Fríggjadagin 07.02. kl. 18⁴⁵




**Frumsýning**
Fríggjadagin 07.02. kl. 20³⁰ – Fríggjadagin 07.02. kl. 23⁰⁰

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**